# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hóast methøgan oljuprís liggur iranski búskapurin í sori við stórari inflasjón og stórum arbeiðsloysi*
*Iranskur politikari*

# Tvær spreingingar vóru í flogfarinum



**Fólk, sum sóu flogvanlukkuna í Russlandi um vikuskiftið, vilja vera við, at teldur kom í flogfarið, og at vær spreingingar vóru í flogfarinum, áðrenn tað datt niður**

*Flogfelagið Aeroflot átti flogfarið*
*Mynd:Polfoto*

Sambært russisku fjølmiðlunum hava vitnini greitt frá, at tey sóu og hoyrdu tvær spreingingar frá Boeing 737-flogfarinum, sum síðani datt niður. Vitnini hava sagt, nær hetta hendi, og flogleiðslan hevur váttað, at hon misti sambandið við flogfarið um tað mundið.

Øll tey 88, sum vórðu við flogfarinum, doyðu. Teirra millum var generalurin Gennadij Trosjev, sum var ráðgevi hjá Vladimir Putin, forseta og ein av teimum ovastu russisku herleiðarunum í krígnum í Kekenia.

Russisku myndugleikarnir søgdu beint eftir vanlukkuna, at tað var einki, sum bendi á, at talan var um annað enn eina vanlukku. Kortini eru fleiri spreingiserfrøðingar hjá russiska hervaldinum komnir til vanlukkustaðið. Flogfelagið Aeroflot, sum átti vanlukkuflogfarið, hevur boðað frá, at tað ger sínar egnu kanningar.

Boeing 737-flogfarið var á veg til býin Perm í Uralfjøllunum, tá tað datt niður stutt frá býnum, sum er einar 1.200 kilometrar eystan fyri Moskva.

## STUTT SAGT

### Hevur ikki verið í Irak

Undir valstríðnum í USA hevur verið sagt, at republikanska varaforsetavalevnið, Sarah Palin, hevur verið í Írlandi og í Irak. Nú vísir tað seg, at hon hevur millumlent við flogfari í Irlandi einaferð, og samstundis hava republikanararnir viðgingið, at hon hevur ongantíð verið í Irak.

Tað var í juli í fjør, at Sarah Palin var og vitjaði amerikanskar hermenn í Kuwait og í Týsklandi, har hon vitjaði særdar amerikanskar hermenn, sum vóru fluttir úr Irak á sjúkrahús í Týsklandi til viðgerðar.

Upprunaliga varð sagt, at hon hevði verið í Irak og vitjað amerikanskar hermenn har, og at hon hevði ferðast í Írlandi. Hetta varð sagt fyri at vísa á, at hon er ikki heilt sør, tá tað snýr seg um uttanríkispolitisk viðurskifti. Men sambært blaðnum The Boston Globe og sjónvarpinum CNN var tað fyrra ein stutt millumlending og søgan um ta seinnu vitjanina var beinleiðis ósonn.

### Kim batnaður

Norðurkoreonskumyndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at landsins leiðari, Kim Jong-il, er batnaður, eftir at hann fekk ein hjartatilburð í síðstu viku.

Seinasta týsdag hátíðarhildu norðurkoreanar, at 60 ár vóru liðin, síðani lýðveldið var skipað, og tá var tann 66 ára gamli leiðarin ikki hjástaddur undir tí almenna hátíðarhaldinum í høvuðsstaðnum Pyongyang. Almenningurin í Norðurkorea hevur ikki fingið bakrar upplýsingar um heilsuna hjá leiðaranum, tí málið er als ikki nevnt í fjølmiðlunum.

Kim Jong-il hevur verið leiðari í Norðurkorea síðani 1994, tá hann tók við eftir pápan.



*Kim Jong-il er batnaður*
*Mynd: Polfoto*

### Vænta fleiri bankahandlar

Veksandi kreppa í fíggjarheiminum ger, at teir stóru bankarnir styrkja seg við at keypa teir smáu

Í morgun frættist úr Danmark, at Nykredit skal keypa Forstædernes Bank, og at Handelsbanken hevur keypt Lokalbanken. Sambært Per H. Hansen, professara á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, kunnu vit vænta at frætta um fleiri slíkar handlar í framtíðiuni. Við Ritzau sigur hann, at slíkir handlar eru vanligir, tá fíggjarheimurin er í trupulleikum, og hann væntar, at meiri ferð fer at koma á hesa gongdina nú.

Tað eru teir smáu og meðalstóru bankarnir, sum royna at styrkja seg ella at bjarga sær, tí trupulleikarnir í fíggjarheiminum gera, at tað gerst altsamt meiri trupult hjá teimum at læna pening til virksemið.

- Tað ger, at bankanir eru undir trýsti og noyðast at gera okkurt fyri yvirhøvur at yvirliva, og tað tryggasta er at finna ein at samstarva við, sigur Per H. Hansen við Ritzau.

# Iranskir politikarar finnast at forsetanum

**Í Iran hava tveir leiðandi politikarar vent sær ímóti tí harðrenda uttanríkispolitikkinum hjá forsetanum og búskaparpolitikki hansara**



*Mahmoud Ahmadinejad stendur nú fyri skotum frá sínum egnu*
*Mynd: Polfoto*

Menninir aftan fyri atfinningarnar at Mahmoud Ahmadinejad, forseta eru fyrrverandi iranski samráðingarleiðarin í kjarnorkumálum Hasan Rowhani og fyrrverandi formaðurin í tjóðartinginum, Mahdi Karroubi.

Teir báðir siga við fleiri iransk bløð, at iranska leiðslan kann ikki sita hendur í favn og sláa altjóða tiltøkini ímóti landsins kjarnorkupolitikki upp í glens. Tað er neyðugt at taka tiltøkini í álvara og at royna at sleppa av við tey, siga teir báðir við bløðini. Teir leggja afturat, at tann harðrendi uttanríkispolitikkurin hjá Mahmoud Ahmadinejad, forseta hevur fingið bæði USA og Ísrael at hótta við álopum, og at hetta skaðar umdømi landsins.

Hasan Rowhani og Mahdi Karroubi eru heldur ikki serliga hugtiknir av búskaparpolitikkinum hjá forsetanum og stjórnini. Teir siga tað vera skelkandi, at forsetin gevur fólki eina fullkomiliga skeiva mynd av búskaparstøðu landsins. Teir siga við bløðini, at sjálvt andaligi leiðarin ayatpllah Ali Khamenei hevur fingið skeivar upplýsingar frá forsetanum um búskapin.

- Sambært frágreiðingini frá forsetanum liva vit í einum paradísi, men hóast metgóðan oljuprís liggur búskapurin í sori við stórari inflasjón og stórum arbeiðsloysi, sigur Mahid Karroubi við iransku bløðini.